# Tað gekk við tógvið stríð

**– Men vit fingu eina semju, tí báðir partar vóru sinnaðir til tað, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelag num**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Mín ábygd er at øll feløg og allir fakbólkar fáa somu sømdir, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður*

– Vit kundu hugsa okkum hægri løn á summum økjum. Men fyrr ella seinni má ein avgerð takast.

Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum, er hampiliga væl nøgdur við sáttmálan, sum varð gjørdur mikumorgunin við Fìggjarmálastýrið um maskinmeistarararnar, sum arbeiða hjá tí almenna, tvs, teir, sum sigla við Strandfaraskipunum og Magnus Heinason og teir, sum arbeiða á sjúkrahúsum og aðrastaðni á landi. Hinvegin eru teir, sum sigla við Vaktar- og Bjargingartænastuni nú blivnir tænastumenn, sum teir eru ikki uppí í í hesum umfari.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sigur, at tilsamans hava maskinmeistararnir fingið eitt lítið sindur hægri lønarhækking, enn hini feløgini hava fingið.

– Vanliga lønarhækkingin og tað, sum hongur uppi í henni, er á sama støði, sum onnur feløg hava fingið. Men harafturat eru viðbøtur, flytingar í hægri lønarflokk o.a. sum ger, at tilsamans verður talan um eitt lítið sindur meiri.

Jógvan Nybo ásannar eins og navigatørarnir, at samanborið við onnur lond, eru maskinmeistarar hjá tí almenna í Føroyum ikki væl lønt.

– Men vit royna at fáa eitt sindur uppá hvørja ferð og tað eydnaðist eisini hesuferð.

– Tað gongur spakiligt, men tað gongur rætta vegin, hvørja ferð.

Hann sigur, at tað var eitt tógvið stríð at fáa semjuna í lag, men hann heldur at tað eydnaðist tí at báðir partar vístu vilja og vóru sinnaðir at finna semju.

– Sáttmálin er galdandi í hálvtannað ár og vit mettu ikki, at tað metti seg at fara í verkfall uppá munin í semingsuppskotinum, sum vit góðtóku og tað, sum annars lá á borðinum til síðst, sigur Jògvan Nybo.

Eisini Karsten Hansen, landsstýrismaður, fegnast um semjuna.

– Mín ábyrgd er, at øll feløg og allir fakbólkar fáa somu sømdir við atliti til teirra serligu umstøður. Tí gleðist eg eisini um, at batar eru gjørdir í sáttmálanum og at semjan er á sama stigi, sum hinir sáttmálarnir, sum gjørdir eru síðsta árið, sigur hann í einum stuttum tíðindaskrivi.

# Fingu 7,3% í lønarhækking og nakrar snøklar afturat

**Eftir at hava samráðst í 66 tímar út í eitt, eydnaðist at at fáa nýggjan sáttmála fyri maskinmeistararnar, sum arbeiða hjá tí almenna**

SAMRÁÐINGAR
Áki Bertholdsen



*Maskinmeistararnir hjá Strandferðsluni og allir hinir, sum arbeiða hjá tí almenna, hava fingð nýggjan sáttmála*

Teir togaðust í 66 tímar út í eitt. Men so glapp.

Tíðliga í gjáramorgunin skrivaðu Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálastýrið undir nýggjan sáttmála fyri maskinmeistararnar sum arbeiða hjá tí almenna.

Tað var seinnapartin sunnudagin klokkan 14, at partarnir settust til samráðingarborðið saman við semingsmonnunum, men ikki fyrrennn klokkan 6 mikumorgunin hildu semingsmenninir, at tíðin var búgvin at leggja semingsuppskot fyri partarnar. Og tað eydnaðist, tí báðir partar góðtóku partarnir.

Nýggi sáttmálin umfatar maskinmeistarar við skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins, maskinmeistarar í almennari tænastu á landi og fyri maskinmeistarar við á Magnusi Heinasyni.

Nýggi sáttmálin er galdandi frá 1. mars í ár til 1. oktoober 2003. Eftir semjuni hækkar vanliga lønin 7,3% til samans í sáttmálaskeiðnum. Tann 1. mars í ár hækkar hon 3,65% og 1. mars næsta ár hækkar hon aftur 3,65%.

Harafturat eru umflokkingar eru gjørdar á Strandferðsluni og hjá almennum á landi. Somuleiðis eru ymiskir batar gjørdir í sáttmálatekstinum.

At enda kann nevnast, at avtala eisini er gjørd um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu.

Umframt lønarhækkingina, eru eisini aðrir batar gjørdir í sáttmálanum. Eitt nú er loksins ásett, at maskinmeistarar nú skulu hava yvirtíð av einum fullum ársverki, tað hava teir ikki fingið áður.

Somuleiðis skal viðbótin til maskinmennirnar hækkast.

Umframt hetta, eru rættiliga nógvir maskinmeistarar fluttir upp í hægri lønarflokkar og lønartalvur.

### Trivnaðurin bøttur

Umframt sjálva lønina, eru eisini ymsar ásetingar í nýggja sáttmálanum sum kunnu nevnast trivnaðarmál.

Eitt nú eigur konufólk, ið eru við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga.

Hinvegin fáa konufólk fulla løn frá tí hon verður óarbeiðsfør, tó í minsta lagi í átta vikur, áðrenn hon væntar sær at eiga og tilsamans 24 vikur.

Afturat hesum kann hon fáa frí við ongari løn í 6 vikur. Harafturat kann hon eftir umsókn fáa frí við ongum missi í starvsaldri í fimm mánaðir.
Men umframt hetta, kann konufólk fáa sjúkrafrí í upp tilæ seks mánaðir, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað stendst heilsuvandi fyri hana sjálva, ella fyri fostri, at vera til arbeiðis. Í serligum føri kann hon fáa frí enn longri.

Tann, sum ættleiðir børn, kann fáa tænastufrí í 24 vikur við løn.

Hinvegin kann mannfólk, ið verður pápi, ella ættleiðir børn, fáa frí í ein mánað við ongari løn.

Harafturat er avtala gjørd um førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk.



## Val og valtøl

Upp undir løgtingsvalið týsdagin hevur Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur, skrivað um søgulig val og valtøl í valdømunum. Serliga hevur hann lagt seg eftir at skriva um valini, sum hava verið síðani 1966. Orsøkin er tann, at í 1966 var fyrsta valið, tá uppstillingin var persónlig og ikki í nummarrøð. Frá og við valinum í 1966 hava tað bara verið persónligu atkvøðurnar, sum hava gjørt av, hvør er komin í løgtingið. Frammanundan hjálptu atkvøðurnar til listan tí fyrsta á listanum at koma inn.

Týsdagin var Norðoya valdømi á skránni, og í gjár var tað Norðstreymoyar valdømi. Hesa ferð eru tað Sandoyar valdømi og Eysturoyar valdømi. Í morgin verður Suðurstreymoyar valdømi á skránni, og sjálvan valdagin verður skrivað um Vága og Suðuroyar valdømir.

# Býtið líkist sær sjálvum hvørja ferð

**Sambandsflokkurin er næstan altíð størstur í Eysturoy, og hinir stóru flokkarnir eiga sum oftast hvør sín umdømisvaldan tingmann. Stóra fólkatalið ger, at sannlíkið fyri eykamonnum til smærru flokkarnar er rættuliga stórt**

EYSTUROY
*Jóannes Hansen*



*Veljarakanningarnar hava bent á stórt sannlíki fyri, at umdømisvaldu umboðini úr Eysturoynni fara at koma úr somu flokkum, sum hava átt umboðini síðsta valskeiðið*

Tað er eingin slingur í valsinum. Sambandsflokkurin er størsti flokkur í Eysturoy. Síðani 1978 hava tað verið fimm umdømisvaldir tingmenn í valdøminum, og Sambandsflokkurin hevur hvørja ferð átt tveir umdømisvaldar. Frammanundan 1978 vóru fýra umdømisvaldir tingmenn. Tá átti Sambandsflokkurin umframt ein umdømisvaldan so at siga á øllum valunum ein eykavaldan í Eysturoy.

Á tveimum valum síðani floksbýtið í 1906 hevur Sambandsflokkurin ikki verið størsti flokkur í Eysturoy. Fyrra ferðin var í 1945, tá Fólkaflokkurin, sum hevði ógvuliga stóra undirtøku undir krígnum, var tólv atkvøður frammanfyri Sambandsflokkin. Og seinna ferðin var í 1954. Eftir sera turbolentu árini við fiskimannaverkføllum og stórum trupulleikum við Sjóvinnubankanum, var Tjóðveldisflokkurin, sum var so mikið feskur, at hann stillaði upp fyri aðru ferð, størstur. Hann hevði tá 941 atkvøður og 104 fleiri enn Sambandsflokkurin.

Síðani floksbýtið í 1906 er tað bara eina ferð komið fyri, at Sambandsflokkurin ikki hevur átt í minsta lagið tveir tingmenn í Eysturoy. Tað var í 1966. Tá varð bara Johan Poulsen á Strondum valdur. Á valinum í 1962 varð umframt Johan Poulsen eisini Jens Chr. Olsen á Toftum valdur. Hann doyði tíðliga í valskeiðnum. Í staðin fyri hann kom Hilmar Petersen í Fuglafirði á ting í 1963, men hann doyði í 1965. Tá kom Reinhold Thomsen í Gøtu inn.

Sambandsflokkurin átti á øllum valunum fram til og við valinum í 1943 trý umboð í Eysturoy, fleiri ferðir áttu teir fýra umboð, og á valinum í 1924 komu fimm sambandsmenn úr Eysturoyar valdømi á ting.

### Høvuðsmenninir í Eysturoy

Tað hevur verið eyðkent fyri Sambandsflokkin í Eysturoy, at hann oftast hevur verið umboðaður í løgtinginum av fremstu persónunum í flokkinum, og at hesir hava verið í langt áramál í politikki. Andrass Samuelsen, sýslumaður í Fuglafirði, sat á tingi í 44 ár. Hann var floksformaður og fyrsti løgmaður í nýggjari tíð. Johan Poulsen hevði, tá hann legði frá sær í 1970, verið í tinginum í 50 ár – tað er met – og hann var floksformaður aftaná Andrass Samuelsen.

Jógvan Ingvard Olsen á Toftum var tingmaður 1970–1998. Hann var sonur Jens Christian Olsen, sum fram til 1963 í fleiri skiftum hevði verið tingmaður í 20 ár tilsaman. Beiggi Jógvan Ingvard Olsen, Alfred Olsen, varð valdur í tingið, tá Jógvan Ingvard ikki stillaði uppaftur.

Jóhannes Martin Olsen á Strondum tók í 1970 við eftir Johan Poulsen. Jóhannes Martin Olsen fall í 1988. Tá varð Edmund Joensen á Oyrabakka valdur. Hann gjørdist skjótt formaður í flokkinum og var løgmaður 1994–1998.

Tá Edmund spleysaði Jóhannes Martin av, og sessurin flutti av Strondum og í Sundalagið, var tað fyrsta ferðin, at eingin á Strondum var í tinginum fyri Sambandsflokkin, og tað var eisini fyrsta ferðin, at ein sambandsmaður í Eysturoy vann tingsessin frá einum øðrum sambandsmanni.

Í 1990 fekk Edmund Joensen 501 persónligar atkvøður. Hetta er hægsta talið, sum nakar umdømisvaldur tingmaður í valdøminum nakrantíð hevur fingið.

### Fáar skiftingar

Burtursæð frá Sambandsflokkinum hava hinir stóru flokkarnir síðstu hálvu øldina so at siga átt støðuga tingumboðan í valdøminum. Frá 1954 og inntil 1966 átti Tjóðveldisflokkurin tveir tingmenn í valdøminum. Í 1962 vóru teir valdir á tveimum listum. Hans Jákup Ellingsgaard á Eiði varð umdømisvaldur á øðrum, og Fredrik Hansen (pápi núverandi landsstýrismannin í fíggjarmálum), sum frammanundan hevði verið tingmaður í átta ár, var eykavaldur á hinum. Frammanundan hevði Frederik verið tingmaður í eitt skeið saman við Olafi Ellingsgaard á Eiði og í eitt skeið saman við Jógvani Høgnesen í Fuglafirði.

Frederik var í tinginum inntil 1970. Tá fall hann fyri Signari Hansen úr Fuglafirði, sum tá var lærari á Strondum. Signar hevur verið valdur hvørja ferð – uttan í 1980. Tá lá Petur Reinert á honum. Kappingin millum teir báðar var ofta tøtt.

Javnaðarflokkurin var næststørstur í Eysturoy í 1966 (tá fekk Petur Eli Mikkelsen, sáli, dygga undirtøku á Toftum, har hann var lærari) og aftur í 1990. Seinnu árini hevur hann fyri tað mesta verið tann minsti í valdøminum av størru flokkunum.

Fyrsti javnaðartingmaðurin í Eysturoy var eiðismaður. Hans Jacob Poulsen varð valdur í 1936. Hann doyði longu 24. januar í 1937, og tá kom Joen Simon Heinesen í Leirvík inn. Á valinum í 1940 varð J. Fr. Øregaarad valdur, og hann var tingmaður inntil 1978. Hann var ættaður úr Leirvík og búði í Gøtu.

Tá Øregaard legði frá sær, var stór kapping um javnaðarsessin. Jørgen Thomsen, sum var ættaður úr Gøtu og búði á Skála, vann hann við 139 persónligum atkvøðum. Tað er lægsta talið, sum umdømisvaldur tingmaður í Eysturoy hevur verið valdur á ting við. Jørgen Thomsen var tann fyrsti og higartil tann einasti skálamaðurin, sum síðani floksbýtið í 1906 hevur verið valdur á ting.

Tá Jørgen Thomsen ikki stillaði uppaftur í 1994, misti Javnaðarflokkurin mannin í Eysturoy. Í staðin vunnu Óli Jacobsen og Verkamannafylkingin sessin. Í 1998 varð Dan R. Petersen, sum er ættaður úr Saltnesi og búsitandi í Fuglafirði, valdur á javnaðarlistanum. Tað var hann í harðari kapping við Andreas Petersen og Sylverius Jacobsen ávikavíst úr Gøtu og av Skála. Teir búgva altso í bygdunum, har Øregaard og Jørgen Thomsen búðu, tá teir umboðaðu Javnaðarflokkin í tinginum.

### Vildu ikki hava havnarmann

Fólkaflokkurin misti nógv í Eysturoy fyrstu árini eftir kríggið, og fram í sjeyti árini var hann minstur av stóru flokkunum. Í 1988 og í 1994 var hann næststørstur, og í 1998 var hann á tryggum triðja plássi.

Poul Petersen, sum var ættaður úr Funningi, og sum starvaðist í umsitingini í Havn, umboðaði Fólkaflokkin í Eysturoy frá 1940 og inntil valið í 1970. Á valinum í 1943 og í 1945 varð Rasmus Rasmussen, Víka Rasmus í Fuglafirði, eisini valdur.

Í 1970 fall Poul Petersen fyri Jógvani Sundstein, sum tá kom á ting fyri fyrstu ferð. Jógvan Sundstein, sum var búsitandi í Havnini, flutti í 1978 til Suðurstreymoyar valdømi. Hann helt ikki, at tað hóskaði, at eitt valdømi var umboðað av persóni, sum ikki búði í valdøminum.

Síðani tá hevur fólkaflokkurin í Eysturoy verið umboðaður í løgtinginum av eysturoyingum, sum hava verið búsitandi í oynni. Og støðugt vaksandi atkvøðutølini kundu bent á, at hetta hevur líkað fólkafloksmonnum í valdøminum. Edmund í Garði varð valdur í 1978, men hann fall fyri Olafi Olsen á Glyvrum í 1980. Hann var fyrsti umdømisvaldi tingmaðurin yvirhøvur, sum var búsitandi á Glyvrum. Olaf sat inntil í 1994, tá hann fall fyri Kjartani Joensen í Leirvík, og Kjartan fall fyri Jógvani á Lakjuni í Fuglafirði í 1998.

Gongdin hjá fólkaflokkinum í Eysturoy frá 1978 og inntil nú er ein staðfesting av hørðu kappingini, sum altíð er millum bygdirnar í oynni.

### Teir smáu eykavaldir

Í hesum valskeiðnum hevur ein eykavaldur tingmaður verið í Eysturoy. Tað er Sámal Petur í Grund fyri Sjálvstýrisflokkin. Merkisvert var tað fyri fýra árum síðani, at Sámal Petur varð valdur við 533 persónligum atkvøðum. Hetta er hægsta persónliga atkvøðutalið nakrantíð í Eysturoy.

Síðani 2. heimsbardaga hava umframt Sámal Petur í Grund tríggir aðrir verið eykavaldir í Eysturoy fyri Sjálvstýrisflokkin: Johan Kallsoy 1950–1954, Fredrik Olsen 1980–1984 og Lasse Klein 1988–1994.

Í 1994 stillaði Lasse Klein upp fyri Kristiliga Fólkaflokkin og varð eykavaldur, men hann fall í 1998. Í 1990 varð Tordur Niclasen eykavaldur fyri Kristiliga Fólkaflokkin, og í 1994 varð hann eykavaldur fyri Miðflokkin.

Adolf Hansen var tingmaður fyri Eysturoy 1978–1988. Inntil 1984 umboðaði hann Framburðs– og Fiskivinnuflokkin, og síðsta skeiðið umboðaði hann Kristiliga Fólkaflokkin. Persónliga atkvøðutalið hjá Adolfi Hansen í 1984 – 117 atkvøður – er tað lægsta, sum nakar higartil er valdur á ting fyri Eysturoyar valdømi við. Tað kunnu tey, sum nú royna at sleppa á ting, leggja sær í geyma.

### Spenningurin

Veljarakanningarnar hava bent á stórt sannlíki fyri, at umdømisvaldu umboðini fara at koma úr somu flokkum, sum hava átt umboðini síðsta valskeiðið.

Nógv skal broytast, um sambandsumboðini og fólkafloksumboðið ikki verða tey somu, sum hava sitið hetta valskeiðið. Javnaðartingmaðurin varð seinast valdur við stuttum gloppi niður til tveir teir næstu á listanum. Spurningurin er, um Dan R. Petersen fer at staðfesta sína støðu sum javnaðarumboð, ella um Skála ella Gøta fara at megna at tiltuska sær javnaðartingmannin aftur, sum tey áður hava havt.

Signar á Brúnni er fyri fyrstu ferð síðani 1966 ikki á tjóðveldislistanum. Spurningurin er, hvat nógvu tjóðveldisveljararnir í Fuglafirði fara at atkvøða. Frammanundan má roknast við, at fólkatingsmaðurin á Glyvrum, Tórbjørn Jacob-